

*Jógvan við góðu gomlu Heidelberg í prentsmiðjuni á Stongunum í Klaksvík*

*Mynd: Astrid Tróndheim*

# Jógvan Tróndheim 75 ár

**Sunnudagin fylti Jógvan Tróndheim í Klaksvík 75 ár. Hóast fleiri ár eru gingin síðani pensjónsaldurin, starvast hann enn á prentsmiðju sínari í sethúsunum á Stongunum, har hann hevur búð alt sítt lív**

FØÐINGARDAGUR

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Kemur tú fram við prentsmiðjuni hjá J. F. Tróndheim í Klaksvík, kann tað enn koma fyri, at tunga suffið frá hansara gomlu Heidelberg hoyrist út í tún. Tað er sum at hoyra ljóðið frá eini farnari tíð…

Jógvan Ferdin Tróndheim er føddur í Leirvík, sonur Mariu og Jakku Tróndheim. Men hann vaks upp hjá Lisu og Eliseusi Jacobsen, sum tóku hann til sín, tá mamma hansara gjørdist sjúk.

Saman við Maud, sum tey eisini tóku til sín, sleit hann sínar barnaskógvar á Stongunum, har tey settu seg niður, tá tey fluttu av Kalsoynni til Klaksvíkar.

## Virkað og livað á sama staði

Jógvan býr enn í barnaheimi sínum, har hann eisini hevur havt egið virki í meira enn fimmti ár.

Sum blaðungur drongur byrjaði hann í starvi á bókhaldsvirkinum, Føroya Bók, sum tá hevði egna prentsmiðju. Har lærdi hann at prenta, og seinni fór hann niður at læra at gera prentmyndir ella kliche'ir, sum tað oftast verður kallað.

Seinni keypti hann maskinurnar frá Føroya Bók, og byrjaði egna prentsmiðju í kjallaranum hjá Lisu og Eliseusi.

Sama árið, í 1951, giftist hann við Másu, og eiga tey 4 børn, Gerhard, Elfinn, Mariu og Eileen.

Tey hava havt tað gleði at upplivað gullbrúðleypsdagin, og abba- og ommubørnini eru nú 10 í tali.



*Sunnudagin fylti Jógvan Tróndheim í Klaksvík 75 ár. Í meira enn fimmti ár, hevur hann havt egna prentsmiðju í sethúsum sínum á Stongunum í Klaksvík*

## Gløggur og trúfastur

Eitt, sum eyðkennir Jógvan, er trúfesti. Síðani ungdómsárini, hevur hann verið ein stuðul í samkomuni í Betesda. Eisini hevur hann saman við øðrum hvørja viku vitjað samkomuna, Saron, á Viðareiði.

Hann er stillførur, erligur og altíð við tí góða orðinum. Mangan tekstin hevur hann rættlisið, og tað, sum er komið frá hansara hond er ringt at seta fingurin á.

Tað er serstakliga áhugavert at práta við Jógvan, og tú fert altíð ríkari frá honum, enn tá tú kom. Sama, hvønn hann tosar við, dugir hann kynsturið at finna teirra bylgjulongd, og ofta kryddar hann samrøðuna við skemtingarsomum viðmerkingum.

## Tjóðskaparmaður

Jógvani untist ikki at vaksa upp saman við systkjum sínum í Leirvík, men hann var ofta á vitjan har yviri. Eitt skifti, tá týskarnir bumbaðu í Klaksvík, gekk hann í skúla har.

Maria og Jakku fingu 13 børn, og var Jógvan tann triði í røðini. Jakku var ættaður úr Norðragøtu og barnaheim hansara var har á leiðini, sum Tróndur í Gøtu skal hava búð. Í 1924, tá tjóðskaparrørslan var í hæddini, keypti hann sær eftirnavnið, Tróndheim.

"Æblet falder sjældent langt fra stammen", plaga vit at siga, og í so máta líkist Jógvan pápa sínum og dylir ikki fyri, at hann er tjóðskaparmaður.

Spyrt tú Jógvan, um hann ikki ætlar sær at gevast at arbeiða, nú hann er vorðin so gamal, svarar hann við einum smíli:

"Tað man fara at koma av sær sjálvum!"



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Lisbeth Nebelong:

# Skrivar um økonomi og kærleika

**Rithøvundurin av nýggju skaldsøguni, "Når engle spiller Mozart", ið júst er komin út í bók, er 48 ára gomla, Lisbeth Nebelong, ið er donsk. Trý ár av lívi sínum hevur hon búð í Føroyum**

Lisbeth Nebelong er donsk, fødd í 1955, dóttir Lise og N.C. Nebelong, sum var fulltrúi hjá ríkisumboðsmanninum Mogens Wahl frá 1965-67. Tey búðu á Lützenstrøð í Havn, í húsunum sum vit kenna sum "Statskassin". Lisbeth gekk í Sankta Frants skúla hesi árini. Hon eigur tvær yngri systrar, Helle og Lotte.

Seinni, frá 1973-1974, kom hon aftur og arbeiddi sum vikarur í Nonnuskúlanum. Tá sang hon eisini við í Havnarkórinum.

Lisbeth er gift við Jesper Krag, ið er sálarlækni, tey eiga sonin Mikkel, sum er 16 ára gamal

Hon er útbúgvin tíðindakvinna og Master of Public Management, MPM. Hon hevur arbeitt á Berlingske Tidende og Børsens Nyhedsmagasin, arbeitt við radio og sjónvarpi og verið kunningarstjóri í Kommunernes Landsforening.

Í dag er hon samskiftisráðgevi og rithøvundur. Seinastu tíggju árini hevur hon skrivað bøkur um privatøkonomi hjá fólki.




*Lisbeth Nebolong uttan fyri Hotel Hafnia. Skaldsøga hennara "Når engle spiller Mozart", gongur eisini fyri seg á Hotel Hafnia*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Tann nýggjasta bókin er Sund økonomi, sum kom út í 2000.

Sum fjølmiðlakvinna hevur Lisbeth Nebelong verið á frásøguferð í Føroyum í 1980, 1985 og í 1989. Í 2000 skrivaði hon eina ritgerð um fullveldisgongdina í Føroyum.

## Um skaldsøguna

Når engle spiller Mozart er hennara fyrsta skaldsøga. Bókin handlar um 44 ára gomlu Lisu Bjørn Nielsen, stjórnmálafrøðing, sum í februar 2000 kemur til Havnar at røða á fullveldisráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Á ferðini til Føroyar hittir hon eina fortíð og ein ungdómskærleika, sum hon trúði, at hon fyri langari tíð síðani hevði lagt aftur um seg.

Sum dóttir ríkisumboðsmannsins gekk hon í 3.G á Føroya Studentaskúla í 1974. Nú kemur hon aftur sum búgvin karrierukvinna. Men ferðin fær eina heilt aðra gongd, enn hon hevði væntað. Hesi trý samdøgrini hon er í Havn fær ikki bert tann politiska tilgongdin eitt álvarsamt skot fyri bógvin, eisini hennara egna sinni verður skakað, tá hon knappliga stendur andlit til andlits við ein longsul og eina trá og møtir skuggum úr egnari fortíð, sum noyða hana at endurskoða alt sítt lív.

"Når engle spiller Mozart" er ein skaldsøga um eina modernaða kvinnu, sum leitar eftir samanhangi og meining í einum fløktum heimi. Um at velja og at velja frá í lívinum, um kærleika, tónleik og politikk. Um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark fyrr og nú, og um veg føroyinga móti sjálvstýri.

Lisbeth Nebelong leggur dent á at tað er ikki hennara egna lívssøga, sum hon hevur givið út sum skaldsøgu. Tí lagnurnar hjá henni og Lisu Bjørn Nielsen í skaldsøguni líkjast ikki.

Í sambandi við skaldsøguna hevur Lisbeth sett seg væl inn í føroysk viðurskifti. Umframt tað at hon hevur búð í Føroyum trý ár av lívi sínum, hevur hon verið her nakrar ferðir og hugt at teimum støðum, sum hon nevnir í bókini, fyri at alt skal vera so rætt sum møguligt. Tað er eisini vert at nevna, at Lisbeth er sera hugtikin av Føroyum, og hevði hon einki havt ímóti at búsett seg her, um familjan gekk við upp á tað.

Mánakvøldið 15. september varð tíðindafundur og hugnaløta í Luongini á Hotel Hafnia, har Lisbeth Nebelong las og segði frá um skaldsøguna, eisini var møguleiki at skifta orð við rithøvundin um evnini í skaldsøguni.

## Elisabeth Justinussen
### – Betta Højgaard
### 1913–2003



Mikudagin 10. september andaðist Elisabeth Højgaard Justinussen, fyrrverandi lærarinna í Klaksvík. Vanliga varð hon nevnd Betta Højgaard. Hon var ættað úr Rituvík. Foreldrini vóru Nicolina, fødd Vang av Glyvrum, og Hans Højgaard, sum var sonur Per, ið var ein av fyrstu niðursetu monnunum í Rituvík.

Nicolina og Hans búsettust yviri á Enda, sum tað verður rópt í Rituvík, og tey fingu tíggju børn: Ninna Petersen í Rituvík, Mina Højgaard, sum í mong ár búði í Rituvík og nú býr í Runavík, Betta, Andreas, sum búði í Vestmanna, Per, sum var bestýrari á sjómansheiminum í Havn, Mona Lydersen, sum búði í Klaksvík, Niclas, sum búði í Rituvík, Henny Davidsen, sum býr á Toftum, Dania Olsen, sum býr í Rituvík og Sommer Højgaard, sum býr í Rituvík.

Eftir á lívi eru nú Mina, Henny, Dania og Sommer.

Betta leyk prógv á Føroya Læraraskúla í 1935. Hon undirvísti fyrsta árið eftir at hava tikið prógv í Árnafirði. Frá 1937 og til 1942 var hon eina lærari í Svínoy, og síðani fekk hon starv í Klaksvík, har hon var frá 1942 og til 1978. Seinastu árini undirvísti hon aftur í Svínoy. Tað var frá 1980 og til 1. februar í 1983, tá ið hon fór úr starvinum vegna aldur.

Betta var á námsskeiði á Idrætshøjskolen í Gerlev í 1946, á Danmarks Lærerhøjskole í 1950 og í 1954 í handarbeiði, árskeið á DLH í 1962–63 og var samtíðis á tríggjar mánaða longum skeiði í at undirvísa evna– og lesiveikum børnum. Nógvu tey seinastu árini, sum Betta undirvísti í Klaksvík, var tað serliga í kristni og við at undirvísa evna– og lesiveikum børnum.

Betta var gift við Poul Justinussen, sum var ættaður úr uppi í Húsi í Svínoy. Tey búðu í meiri enn hálva øld í húsunum, sum tey lótu byggja á Gerðareiði í Klaksvík. Poul var 84 ára gamalur, tá ið hann doyði 1. mai í ár. Poul var kendur útróðrarformaður, sum tað lá serliga væl fyri hjá at royna eftir upsa við snellu. Poul átti útróðrarbátin Fuglberg, og seinni keypti hann eisini Áarberg.

Tey bæði vóru nógv upptikin av arbeiðnum hjá KFUM&K í Klaksvík, har tey eins og í kirkjuni vóru ógvuliga trúføst.

## Prógv sum pedagogur



*Brynhild undir Kletti Johansen hevur tann 26. august 2003 lokið prógv sum pedagogur á Jydsk Pædagogisk Seminarium.*

## Esmar Berg 50

Týsdagin 16. september fylti Esmar Berg í Hvalba 50 ár. Esmar er hvalbingur, sonur Onnu Sufíu, f. Djurhuus, úr Sumba, og Daniel Jacob Berg úr Hvalba. Esmar tók læraraprógv á Føroya Lærarаskúla í 1981 og er lærari í Hvalba. Hann hevur verið limur í nevnd Føroya Lærarafelags frá 1988 til 1997, og var hann formaður felagsins frá 1992 til 1997. Esmar er giftur við Elsu Birgittu Petersen, skúlaleiðara í Hvalbiar skúla.



## Dagurin

**17. september. Lambertus,** deyður í umleið 705. Biskupur í Maastricht í Hálandi. Varð dripin av aðalsmonnum, tí at hann setti at teimum fyri ólevnað.